aði við einum skipi hjá Lauritzen.

– Eg sigldi bæði við køliskipi og við tangabáti. Umframt at sigla í Europa komu vit víðan. Eg kann t.d. nevna, at vit sigldu gjøgnum Suez veitina og umvegis Aden og Singapore komu vit bæði til New Zealands og Kina, og hinvegin sigldu vit úr Onglandi og umvegis USA og Kanada og suður til Braisilia og Argentina.

– Tá eg fekk møguleikan at søkja kjans við Reyða Krossi, vóru vit staddir onkustaðni mitt í Indiska havinum. Kjartan Dalsgarð úr Skálavík var skipari. Hann helt, at tað gjørdi tað sama, um eg valdi at halda fram at sigla, ella um eg fór heim. Eg fór at iðra meg um báðar avgerðirnar, og eg havi skilt, hvat tað var, sum hann meinti við.

Inn við móðurmjólkini

Tá Jukim Olsen í 1964 kom á Matrikulstovuna, kendi hann tað, sum um hann hevði fingið starvið, ið hevði við alt tað at gera, sum hann, heilt frá tí at hann var smádrongur, hevði hoyrt um og havt áhuga fyri úti í Svínoy.

– Tá varð arbeitt við at matrikulera, og eitt tað fyrsta, sum tey fingust við, tá eg kom hagar, var at matrikulera Havnina. Frammanundan var matrikulerað niðan um plantaguna. Vit matrikuleraðu eisini úti á bygd, og tað var um somu tíð, at tað varð arbeitt við útskiftingum, bæði innangarðs og uttangarðs. Nógv av tí arbeiðnum gekk fyri seg á Matrikulstovuni. Hans Olávus Danielsen og Olavur Clementsen plagdu at vera stjórar fyri útskiftingunum, og vit vóru uppií og vóru m.a. til staðar, tá útskiftingarnevndirnar hildu fundir saman við bygdafólkunum kring landið. Tað var lærurikt, spennandi og til tíðir ikki sørt stuttligt eisini.

– Eg havi ikki arbeitt suðuri í Suðuroy, men í flestu av hinum oyggjunum er tað fallið í mín lut at vera uppií, og tað er ein av orsøkunum til, at eg kenni og beri kenslu á hilt fitt av fólki, og tá tað er soleiðis, so verður tað náttúrligt ofta at fara at heilsa uppá, tá serlig høvi eru. Og nú er tíðin til tað, nú arbeiðsdagurin er lokin.

Stórar broytingar

Tá tosið dettur á Svínoy og svínoyingar, minnist Jukim aftur á barnaárini:

– Hjalmar Hátún var lærari í Svínoy. Svínoyingar hildu so ógvuliga nógv av honum, og tað var ikki at undrast á, tí hann var framúr í skúlastovuni og eisini á so mongum øðrum økjum. Eg fór í skúla tann dagin, tá eg fylti seks ár, og eg minnist, at vit sum smádreingir plagdu at telja, hvussu nógv fólk búðu í bygdini. Hetta var eitt sindur fyri kríggið, og vit plagdu at koma upp í 237 og 238. Skúlabørnini vóru onkuntíð 44 í talið, og eg haldi, at úti á Kirkju vóru tey umleið so nógv, sum tey vóru í Svínoy, so tað kann ikki sigast annað, enn at tað er nógv broytt.

– Fólkatalið tók ikki at minka rættuliga fyrrenn væl eftir kríggið. Onkur fluttu millum kríggini, men lívsmynstrið við skipsmonnum, sum vóru heima um vetrarnar, helt sær leingi, og tað var ikki fyrrenn tað broyttist, at fólkatalið av álvara tók at minka.

Tað var avmarkað, hvussu nógvir menn fingu kjans at sigla niður við fiski undir krígnum. Nógv fólk var heima, og tí var nógvur útróður. Roynt varð at betra um umstøðurnar hjá teimum, sum róðu út, og svínoyingar vóru millum teirra, sum bygdu sær íshús, sum tað varð kallað. Har goymdu teir agnið, og so avreiddu teir inni í Sundi, sum teir siga. Eitt skifti varð fiskurin seldur til S. P. Petersen í Fuglafirði.

– Í 1944 varð mær litið til at umsita íshúsið. Tá teir ætlaðu sær til útróðrar, so sendu teir boð eftir mær at flýggja teimum agn, og tað kundi vera allar tíðir á degnum. Teir flestu, sum tá róðu út, eru nú farnir, men eg minnist teir við tøkk og virðing, og tú kanst ætla, at eg royndi at leggja meg eftir ti, sum teir tosaðu m.a. um veður, vind, streym og fiskiskap.

Førningurin

Jukim Olsen er yngstur av fýra synum hjá Jógvani á Geilini og Elsebeth Malenu, sum var ættað frá uppi á Húsi. Olivur, sum var nummar tvey í røðini, býr í Klaksvík. Esbern var næstyngstur. Hann búði í barndómsheiminum í Svínoy, men nú eru longu nógv ár síðani hann doyði. Petur ella Pedda, sum doyði fyri einum ári síðani, var elstur. Hann var brekaður, og Jukim hevur so ofta tikið til, hvussu góður og umhugsin Pedda var fyri lítla beiggjanum:

– Tað vóru sjey ár millum okkum báðar. Pedda gekk í skúla inntil hann var tólv ára gamal. Tá hann var farin úr skúlanum hevði hann meg við sær norður í gerði og aðra staðni, har hann fór, og eg haldi, at tað millum annað var fyri at tey skuldu hava betri tak á, hvar eg var, at foreldrini sendu meg í skúla, longu tá eg var seks ára gamal.

Svínoyingar vita at siga frá, at bæði Jógvan og Elsebeth Malena á Geilini vóru fróðarfólk, og tað er sjón fyri søgn, at Jukim hevur lagt sær væl í geyma. Hann tykist hava vitan um og innlit í familju, jørð og landbúna, skip, bátar og fiskiskap, skúla, kirkju og samkomu, skaldskap og soleiðis kundi vit hildið á.

Tá vit spyrja, hvar hann hevur lært um staðarnøvnini í Svínoy, so hevur tað eisini sína søgu:


– Eg minnist væl menn, sum vóru føddir tíðliga í seinnapartinum av fyrru øldini, og hvat teir tosaðu um, t. d. í sambandi við fjall og útróður. Mammubeiggi mín, Heini Justinussen ella Heini uppi í Húsi, hevði sera gott innlit í nógv viðurskifti, hann var góður frásøgumaður, og hann hevði serligan áhuga fyri staðarnøvnum.

Hetta sigur Jukim Olsen, sum hjá mongum má kennast sum ímyndin av Svínoy og svínoyingum. Í morgin røkkur hann dustsins ár. Hann hevur mangan verið hollur í ráðum og leiðbeiningum. Vit heilsa honum og ynskja hjartaliga tillukku.



Tey eru mong, sum kenna mannin, og tey flestu munnu komast við hann. Jukim er svínoyingur, og tey, sum ikki vita tað frammanundan, verða skjótt greið yvir tað, tá tey hoyra hann taka orðið eitt nú í Ebenezer, har hann hevur havt sína dagligu gongd, síðani hann kom til Havnar

Mynd: Jens Kristian Vang



Í morgin røkkur Jukim Olsen dustsins ár. Hann hevur mangan verið hollur í ráðum og leiðbeiningum

Mynd: Jens Kristian Vang

